# Mál- og avrikssáttmáli

millum

TAKS og Fíggjarmálaráðið

2015

## Inngangur

TAKS er fyrisitingarliga skipað sum ein stovnur undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum við skrivstovueindum kring landið.

Høvuðsuppgávan hjá stovninum er at umsita toll-, avgjalds-, MVG- og inntøkuskattalógina.

Aðrar umsitingarligar uppgávur hjá TAKS eru:

- Umsiting av frítíðarløn og trygdargrunni løntakaranna.
- Umsiting av Eftirlønarlógini
- Umsiting av Barsilskipanini
- Umsiting av Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin
- At krevja inn gjald til Arbeiðsloysisskipanina.
- At umsita FAS-skipanina.
- At krevja inn almenna skuld.
- At umsita stuðulslóggávu.
- Innkrevjing av Heilsutrygd.
- Innkrevjing og útgjalding úr Vinnusjúkugrunninum.
- Lóggávuarbeiði fyri Fíggjarmálaráðið og ráðgeving um galdandi lóggávu og um onnur viðurskifti á skatta- og avgjaldsøkinum.

| **Missión** | **Visjón** |
|---|---|
| TAKS tryggjar tí almenna skatta- og avgjaldsinntøkur, umsitur gjøld og veitingar, og fyribyrgir ólógligum inn- og útflutningi sambært galdandi lógum. | *Taks skal vera besti almenni stovnur í Føroyum* |

| **Virðir** |
|---|
| *Vit virðismeta virkisfýsni*<br>*Trúvirði er ein fyritreyt fyri okkara arbeiði*<br>*Vit eru tænastusinnað*<br>*Menning og vitan er avgerandi fyri okkum*<br>*Vit eru einstaklingar, men partar av eini heild*<br>*Okkara úrslit eru best, tá ið vit trívast* |

### Lýsing av TAKS

TAKS skal veita eina góða tænastu og hava eftirlit við, at landskassin fær lógarásettu inntøkurnar.
Skattaborgararnir eru vorðnir alsamt meira ymiskir við ymiskum tørvi á tænastum. Gongdin setir tí eisini onnur krøv til uppgávurnar og tænasturnar hjá stovninum.
Tað er umráðandi, at skattaumsitingin er virkin, og at stovnurin framhaldandi mennir KT-skipanir og samskifti sum eina heild.
KT-menningin seinnu árini gevur TAKS partvís møguleika at lata viðskiftafólkini avgreiða síni viðurskifti sjálvi við sjálvavgreiðslum á internetinum. TAKS fer eisini í 2015 at raðfesta KT-verkætlanir, sum stuðla undir at viðskiftafólkini í størri og størri mun kunnu avgreiða síni viðurskifti við TAKS við sjálvsgreiðslum.

Neyðugt er at tryggja, at stovnurin hevur røttu arbeiðsamboðini, m.a. KT-amboð og førleikar. Tilgongdirnar skulu eggja til kreativitet, tvørfagligt samstarv og proaktivitet.

## TAKS - Upplýsing og eftirlit

TAKS hevur bundnar arbeiðsuppgávur, sum yvirskipað eru orðaðar í missióni. Hesar uppgávur skulu loysast bæði við upplýsing og eftirliti.

Við upplýsing, soleiðis at okkara kundar á ein lættan og rættan hátt, <u>skilja og vilja</u> bera seg rætt at mótvegis TAKS

Við eftirliti, soleiðis at okkara kundar eisini vita av, og kunnu rokna við at TAKS hevur eitt vælvirkandi eftirlit, og at tað tískil er skilabest at hava síni TAKS-viðurskifti í lagi.

Býtið ímillum upplýsing og eftirlit er trupult at áseta, og fer eisini at broytast frá einum tíðarskeiðið til annað eftir tørvi, men tað skal eingin ivi verða um, at TAKS-arbeiðið er grundað á hesi bæði grundsjónarmiðini. Í 2015 verða hesi bæði javnt raðfest.

## Yvirskipað stregegitarbeiði

Í 2010 byrjaði stórt strategiarbeiði. Úrslitið av hesum er, at TAKS hevur fingið nýggja missión, visjón og virðir. Stórsta broytingin er, at TAKS hevur fingið eina nýggja visjón, og málið er rættiliga ambitiøst: **TAKS skal vera besti almenni stovnur í Føroyum**. Hetta arbeiðið helt fram í 2011, fyri gera hetta ítøkiligt. Í 2012 varð serlig áherðsla løgd á leiðslu- og organisatiónsmenning. Í 2012 varð bygnaðurin eisini endurskoðaður og tillagaður. Í 2013 var atgongds-profilurin hjá TAKS mótvegis kundunum endurskoðaður og broyttur. Hetta viðførdi at avgreiðslunar uttanfyri Havnina lótu aftur. Hetta arbeiðið helt fram í 2014, og kemur eisini at merkja byrjanina av 2015 orsakað av ymiskum seinkingum. Um árskifti 2014/2015 flytur TAKS í nýggj hølir á Skálatrøð. Hendan broyting saman við fleiri sjálvsavgreiðlsum, kann best lýsast við at: **"TAKS verður ikki minni til TAKS, men øðrvísi".** Í 2015 er eisini ætlanin at gera stratgiarbeiði meira ítøkiligt, bæði uppá styttri og longri sigt.
Yvirskipaði tankin við øllum arbeiðinum hjá TAKS skal vera at betra um um umdømi hjá TAKS á øllum økjum. Á tann hátt verður langsigtaða uppgávan hjá TAKS lættari, og bæði viðskiftafólk og starvsfólk verða nøgdari.

## Fokusøkið 2015

Førleikamenning
Tænasta og góðska
Menning av sjálvsgreiðslum og avleiddum innanhýsis skipanum
Processmenning á deildum og ímillum deildir
Konvertering av KT-fakskipanum hjá TAKS

Hesi fokusøkið síggjast aftur í útvaldu verkætlanunum aftast í hesum sáttmálanum.

## Eftirlitsætlan

Fyri at styrkja og skipa eftirlitið eru ætlanir gjørdar fyri ymsu fakligu økini hjá TAKS. Ætlan er gjørd fyri skatt, MVG, toll, stuðlar, vinnuskrá og innheinting.

***Hækka tænastustøði***
Eftirlitsætlanirnar taka m.a. støði í, at TAKS skal vera sjónligt. Hetta byggir á grundstøði um, at er TAKS sjónligt, hevur tað eitt fyribyrgjandi árin. Kunnleiki er um vágan av tilvitað at bróta reglurnar. TAKS sjónligt tekur eisini støði í, at samskiftið skal betrast, og hugburðurin til TAKS skal betrast.

***Handla proaktivt***
Avleiðingin er, at samstarvið millum TAKS og viðskiftafólkini betrast og harvið úrslitið bæði fyri viðskiftafólkini og fyri TAKS. Eisini snýr TAKS sjónligt seg um, at TAKS ger sær stóran ómak, at tað skal vera lætt at gera rætt.

***Málrættað eftirlit***
Eftirlitsøkini verða vald m.a. við støði í, um tað fyriliggja upplýsingar, sum benda á, at tað eru ymiskar fatanir av, hvussu reglurnar skulu umsitast.

Váðametingar, og tann fyrimunur vit hava við at búgva í einum lítlum samfelagið, skulu vera grundarlagið fyri, hvørji eftirlit skulu gerast. Stórur dentur skal leggjast á, at eftirlitini skapa best møguligt gagn. Mett skal vera í hvørjum føri um týdningin fyri júst at gera ávísa eftirlitið innan ávísa virkisøkið.

Fyri at økja um virkni er neyðugt at fáa tey røttu amboðini í samband við eftirlitsarbeiði. Tað skal vera lættari og skjótari at taka út eftirlitshagtøl.

Úrslitini av eftirlitsarbeiðinum eru, umframt úrslitini av ítøkiligu eftirlitunum, at uppskot skulu gerast til rundskriv og/ella greiðari vegleiðing til lóggávuøkini ella uppskot til møguligar lóggávubroytingar, so ivamál og ógreiða verða burturbeind, og kunningarátøk.

**KT-umleggingin á Elektron skuldi ætlandi gjøgnumførast á heysti 2014, men hetta eydnaðist ikki. Hetta skal so gerast í 2015, og kemur at ávirka arbeiði hjá TAKS í 2015. Talan er serliga um at starvsfólkini koma at brúka orku til at testa nýggju KT-tøknina, og alt í mun til hvussu hetta arbeiði gongur, kemur tað at ávirka dagliga arbeiði á ymisku deildunum.**

***Samlaðu eftirlitsmálini eru:***

| Slag av eftirliti | Ábyrgd | *Ætlað 2013* | Staðfest 2013 | *Ætlað 2014* | Staðfest 2014 | *Ætlað 2015* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skattur/persónar** | Løntakaraeftirlitið | | | | | |
| **Skattur/vinnuligt** | Virkiseftirlitið | | | | | |
| **MVG** | MVG-deildin | | | | | |
| **Tollur** | Tollbúðin | | | | | |
| **Rentustuðul** | Tvøroyri | | | | | |
| **Ferðastuðul** | Tvøroyri | | | | | |
| **Eftirlit íalt** | | | | | | |

**Herav x útgjaldseftirlit*

Eftirlitið er í stóran mun grundað á hvat hvat fellur í eyguni hjá starvsfólkunum undir líkningini, og tá verða "áhugaverdar" sakir lagdar til síðis til nærri kanningar. Tí er eisini trupult at nágreina júst hvat eftilitsarbeiði verður løgd størst áherðsla á í 2015, men tó er ætlanin m.a at arbeiða við hesum:

- X
  - x
  - x
    - x
- X
  - x
    X
    x
- X
- X
  - x
    x
- X
  - X
    x
- X
- X
  - X
- X

- X
    - X

- X
    - X

## Innheinting

Innheintingin hevði sum mál fyri 2014, at samlaða eftirstøðan skuldi minka við minst 2%. Samlaða eftirstøðan minkaði úr 350,1 mió. niður til 342,5. Um hædd verður tikin fyri einum nýggjum kravslagi, sum kom í 2014 (veiðigjald), so minkaði skuldin við 3,2% í 2014.

Málið fyri 2015 er, at eftirstøðan framhaldandi skal minka og minst við 2%. Hetta gevur eina skuld á 335,5 mió. ultimo 2015.

***Innheintingarmál fyri 2015***

| | Ultimo 2012 | Ultimo 2013 | Ultimo 2014 | Mál ultimo 2015 |
|---|---|---|---|---|
| **MVG** | 117.000.000 | 89.600.000 | 78.700.000 | 71.800.000 |
| **B-skattur** | 21.000.000 | 22.100.000 | 20.500.000 | 20.900.000 |
| **Írestandi skattur** | 91.000.000 | 89.500.000 | 85.500.000 | 84.200.000 |
| **Partafelagsskattur** | 37.000.000 | 36.500.000 | 35.300.000 | 36.600.000 |
| **Morarentur** | | | 78.800.000 | 82.400.000 |
| **Annað*** | 115.000.000 | 112.400.000 | 43.700.000 | 39.600.000 |
| **Tilsamans** | **381.000.000** | **350.100.000** | **342.500.000** | **335.500.000** |

**Bólkurin "Annað" er samansettur av 30 ymiskum kravsløgum, t.d. Barnapengar, útendsk krøv, Heilsutrygd og annað.*

**Útvaldar verkætlanir 2015**

| Fokusøki | Átak | Endamál | Mál í 2015 | Mettur kostnað-ur |
|---|---|---|---|---|
| Tænasta og góðska + Processmenning | Høvuðsdeildin hjá TAKS flytur í nýggj hølir á Skálatrøð | Betri hóskandi hølir. Effektivisering, betri samstarv vm. | Skuldi verið avgreitt í 2014, men er seinka til primo 2015. | Íløga á tkr. 500-1.000, men ávís sparing við tíðini. |
| Tænasta og góðska. Førleika-menning | Seta projektstarvsfólk (Málfrøðing) at endurskoða og menna samskifti við borgaran, herundir serliga brævasamskifti. | Hækka um málstøði á TAKS, og betra um samskifti út til borgaran og internt | Byrjar í starvi í januar 2015 og skal saman við projektbólki m.a. endurskoða øll skriv sum fara út frá TAKS | Eitt ársverk umframt møguliga stuðla við eksternari undirvís-ing Uml. 0,5 mió. |
| Lógarkravt | Verksetan av Eftirlønarlógini | | Eftirlønarlógin er í stóran mun verksett í 2014, men partar verða verksettir í 2015 (B-inntøkur) | |
| Process-menning og menning av eftirliti | Fyrireika nýtslu av e-roknskap verkætlan-ini. | Fyrireika analysuamboð, nú TAKS í 2016 fer at fáa skattarokn-skapir talgilt | Greining av hvussu TAKS gagnnýtir hesar møguleikar best. Herundir eisini hvussu eftirlits-arbeiði skal skipast frameftir. | |
| Process-menning | Gera strategiarbeiði meira ítøkiligt uppá bæði stutt og longri stigt, umframt gera ætlan fyri hvussu TAKS kann arbeiða meira projektskipa. | TAKS hevur nógvar ætlanir fyri framman, men hetta eigur at leggjast í meira greiðar karmar | Fáa eksternan veitara/ráðgeva at hjálpa til við hesum arbeiði | Uml. 0,5 mió. |
| KT konvertering | Nýggjan KT-platform á Elektron | Flyta av Mainframe á nýggjan tíðarhóskandi platform | Skuldi eftir ætlan verða liðugt seint í 2014, men verkætlanin hevur ikki gingið sum ætlað. Kemur at | Samlaður kostnaður á 25 mió. |

| Fokusøki | Átak | Endamál | Mál í 2015 | Mettur kostnað-ur |
|---|---|---|---|---|
| | | | merkja arbeiði á TAKS í 2015 | |
| Førleika-menning<br>Tænasta og góðska | | Hækka fakliga støði við førleikamenning | Brúkast skulu 5.500 tímar til førleikamenning. Svarar til uml. 2,5%. Royndarprojekt sum skal eftirmetast | |
| Prosess-menning<br>Tænasta og góðska | Nýtsla og menning Borgaraglugga | Stuðla undir at meira verður avgreitt á netinum | Borgaragluggin verður verksettur í 2015, men avbjóðingin verður at fáa hann breiddan út, soleiðis at hann verður nógv brúktur | |
| Menning av sjálvsgreiðslum og avleiddum innanhýsis skipanum | Enduskoða alla tilgongdina ísmb. við útskriftir v.m. úr okkara KT-skipanum og aðrar arbeiðsgongdir rundanum fakskipanir | Við meira og meira sjálvsgreiðslum, er neyðugt at tillaga útskriftir , arbeiðsgongdir v.m. | Allar útskriftir skulu vera endurskoðaðar í 2015 | |
| Process-menning<br>Innaneftirlit | Styrkja innaneftirlitið | Roknskapar-deildin stendur á odda fyri at styrkja innaneftirlitið | Bleiv ikki liðugt í 2014 og skal tí avgreiðast í 2015 | |
| KT-verkætlanir<br>Process-menning | Uml. 20 størri og smærri verkætlanir/tillaging-ar | Fleiri eru lógarkravdar tillingar, meðan fleiri eisini hava fokus á effektivisering og tænastu | Ovarliga á raðfestingarlista-num eru t.d.:<br>Effektivisering av útflutningsmanna-gongd í tollinum.<br>Ferðastuðul Rentustuðul | |
| Processmenn-ing á deildum og millum deildir | Tvørgangangdi projektir við fokus á processoptimering | Effektivisera arbeiðsgongdir | Onkrar verkætlanir eru byrjaði í 2014 sum halda fram, | |

| Fokusøki | Átak | Endamál | Mál í 2015 | Mettur kostnað-ur |
|---|---|---|---|---|
| | | | ímeðan nýggja eisini byrja í 2015.<br>Arbeiðstoppar á ymisku deildunum<br>Journalisering<br>Forvæntningsav-stemman. | |
| Førleika-menning | Gera eina skipaða førleikamenning | Arbeitt er við skipaðar førleikamenning í 2014. Eftir er at implementera, og gera eitt útbúgv-ingarkatalog | Implementerast og setast í verk í 2015 | |
| | | | | |

Avtalað er at TAKS ger kvartárligar statusfrágreiðingar til Fíggjarmálaráðið. Hesar frágreiðingar vísa ein stuttan og greiðan status uppá tey viðurskifti, sum beinleiðis kunnu mátast.

Tórshavn, hin 15. januar 2015

______________________________ ______________________________

Bjarni A. Bjarnason
Fíggjarmálaráðið

Eyðun Mørkøre
TAKS